tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 95 Friggjadagur 23. mai 1997 71. árgangur Kr. 7,00

Móttøka

Í sambandi við at

tíðindablaðið sosialurin

leygardagin 24. mai verður

70 ár

verður almenn móttøka
í blaðhúsinum á Argjum
í dag, 23. mai,
frá kl. 16-18

Øll eru vælkomin

# Suðringur roktúr eftir kongafiski

Fekk 215 tons av kongafiski í Irmingarhavinum í 10 dagar. Hetta kemur sera væl fyri arbeiðsfólkið á Tvøroyri

Síða 3



# AGF vil hava Rógva Jacobsen

Síða 19



# Løgtingið boðið at vitja bretska parlamentið

Føroyskir løgtingsmenn við Jógvan Ingvard Olsen, tingformanni á odda eru boðnir at vitja bretska parlamentið í heyst

Síða 4

Loppumarknaður & Tombola
verður í HAVNAR KLUBBA
leygardagin 24. mai frá kl. 9-13
GIKTAFELAGIÐ

# Løgtingið boðið at vitja tað bretska parlamentið

JAN MÜLLER

Løgtingið er boðið at vitja bretska parlamentið. Nú um dagarnar fekk Jógvan Ingvard Olsen, tingformaður eina innbjóðing sendandi gjøgnum bretska konsulin í Føroyum.

Formansskapurin í bretska parlamentinum skrivar í innbjóðingini, at hann fegin vil síggja umboð fyri føroyska løgtingið. Talan er um umboð fyri bæði uttanlandsnevnd og vinnunevnd. Nevnt er talið 8 tingmenn umframt embætisfólk.

Jógvan Ingvard Olsen sigur, at løgtingsins formansskapur hevur enn ikki viðgjørt málið men fer at gera tað í næstuni. Formansskapurin fer so eisini at tosa við landsstýrið um málið.

Sjálvur heldur hann tað vera eitt sera gott hugskot at vitja bretska parlamentið. Talan er jú um ein av okkara næstu grannum, sum vit hava havt nógva samvinnu við.

Hetta er annars fyrstu ferð, at Føroya Løgting fara eina slíka innbjóðing úr Bretlandi.

Verður vitjanin til nakað, so verður tað helst í oktober mánað.

Uppá fyrispurning um hann sær innbjóðingina úr Bretlandi sum eina roynd at ávirka føroyskar myndugleikar, soleiðis at skaptir verða møguleikar fyri samvinnu á eitt nú oljuøkinum - og kann marknatrætan eisini liggja í „bakhøvdinum", tá slík innbjóðing kemur?

-Tað er ilt at meta um. Eg haldi í hvussu er, at tað er sera positivt at lata dyrnar upp fyri einum samarbeiði millum hesi bæði grannalondini. Tað hevur stóran týdning, at politikarar úr tveimum grannalondum kunnu hitta hvør annan soleiðis at ein seinni, tá bruk er fyri at tosa saman, kennir personarnar.

*-Nú hevur løgmaður fingið eina innbjóðing at vitja Bretland. Men tað skilst, at hann trevðugt við fara soleingi bretar halda fast um síni krøv í marknatrætuni? Um nú løgtingið ger av at taka av innbjóðingini, stríðir tað tá ímóti andanum hjá løgmanni ikki at taka av slíkum innbjóðingum, soleingi marknatrætan stendur við?*

Jógvan Ingvard Olsen heldur løgtingið liggur omanfyri alt hetta. Eingin orsøkin er til at siga nei takk til slíka innbjóðing fyri tað at londini eru ósamd um markið.

-Tingið og landsstýrið eru í ymiskum støðum í hesum máli. Stjórnirnar standa eitt sindur øðrvísi yvirfyri hvørjum øðrum enn parlamentini gera tað.

## Rætt knýta tættari bond við Bretland

Bretski konsulin í Føroyum, Johan Mortensen sigur í eini viðmerking til umrøddu innbjóðing úr Bretlandi, at hann er sera fegin um, at ein slík innbjóðing er komin, havandi í huga hvussu nógv ár síðani, tað hevur verið ein dialogur millum løgtingið og bretska parlamentið og eisini havandi í huga, hvussu stórt samband er millum grannatjóðirnar báðar.

Johan Mortensen sigur, at tað dag er ein stórur samhandil við fiski millum londini og at tað áttu at verið møguleikar at víðka um henda samhandil.

Fyri ikki at tosa um møguleikarnar fyri samvinnu á oljuøkinum í framtíðini.

## Fáa nógvar innbjóðingar frá oljufeløgum

Jógvan Ingvard Olsen vísir annars á, at løgtingið fær hópin av innbjóðingum. M.a. hava fleiri av oljufeløgunum, sum hava áhuga fyri at arbeiða í føroyskum øki sent tingmonnum og tingnevndum innbjóðingar at vitja og síggja teirra virksemi.

-Vit hava lagt okkum eina við, at Føroyar skulu tosa við einari tungu í hesum máli, og har verður einki broytt. Har hava vit viljað verið ógvuliga varnir og roynt at havt eina felags støðu soleiðis at einstakir løgtingslimir ikki hvør í sínum lag fara út og vitja tey ymsu feløgini. Vit í formansskapinum halda tað verða skilabetri á núverandi støði at fara út og vita, hvussu aðrir hava handfarið hetta málið reint politiskt.

Í hesum sambandi hevur verið tosað um at senda umboð fyri tingið til Noregs og Danmarkar at kunna seg við málið har. Følarar hava verið úti og kann tað blíva aktuelt at fara til hesi londini í heyst fyri at vita, hvussu teir har politiskt hava handfarið oljuvinnuna frá byrjan av.

-Tað kann so eisini vera gott at fáa nøkur góð ráð at hava heimaftur við, áðrenn vit fara undir at viðgera oljulóggávuna á tingi sigur Jógvan Ingvard Olsen.

## Tingið nógv um at vera

Tingið fær annars nógvar vitjanir í ár og hevur eisini fingið nógvar innbjóðingar til tiltøk og hendingar í øðrum londum. Í fjør vitjaði tingformaðurin parlamentið á oynni Man, og á ólavsøku í ár koma fólk frá Manska parlamentinum til Føroyar.

Tingið er so eisini boðið við til 75 ára hátíðarhaldið á Álandi 10. juni og verður umboðað av tingformanninum við konu.

Eisini er ein innbjóðing at vitja Kiel í Týskalandi. Eitt umboð er so eisini boðið við at vera við til eina umhvørvisráðstevnu, sum verður fyriskipað av ST í New York. Har fer formaðurin í Trivnaðarnevndini, Ernst Hansen.

Seinast í august mánað fær løgtingið vitjan av formansskapinum í danska fólkatinginum.

Umframt hesar eru eisini fleiri aðrar innbjóðingar.



*Jógvan Ingvard Olsen fer møguliga í næstum at pakka kuffertið og leggja leiðina til London, har hann saman við øðrum tingmonnum skal vitja parlamentið*



*Føroyskir tingmenn eru boðnir at vitja bretska parlamentið í London*